ítróttur

Nr. 213 • leygardagur • 4. november 2000 • 74. árgangur • www.sosialurin.fo



Kvinnurnar hjá VÍF tykjast ætla at gera sigursvandu monnunum kynstri› eftir

Mynd: Álvur Haraldsen

VÍF-Neistin 32-14 (16-7)

VÍF skal takast í álvara

Kvinnuli›i› hjá VÍF leg›i einki í drúgvu si›venjuna hjá Neistanum, men sendu tær hinvegin til Havnar vi› stórtapi

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Uttan at taka munnin ov fullan kann sigast, at VÍF kvinnurnar sendu eina kraftiga ávaring til hini li›ini hóskvøldi›.

Sigursvandu neistakvinnurnar hava kanska ikki veri› heilt so einará›andi seinnu árini, men hinvegin hava tær eisini hesa tí›ina veri› vi› í oddinum, hóast talan ikki er vor›in um gullmerki.

Ni›urspældar

Sigurin hjá VÍF gjørdist ikki minni enn 18 mál, og ta› man vera langt sí›ani, at neistakvinnurnar hava fingi› ein slíkan lúsing.

Til teirra verju kann sigast, at tær máttu vera tær bá›ar, Ingu Danberg og Bjrøg Patursson fyri uttan, umframt at Súna Mørk í fyrra hálvleiki fekk ein snudd í fótin, sum merkti hana restina av dystinum.

Hetta skal tó ikki á nakran hátt dylja yvir, at VÍF í ár tykist hava eitt li›, sum veruliga tykist ætla sær naka›.

Gó›ur styrkur

Li›i› hevur í ár havt tilgong av bæ›i føroyskum og útlendskum leikarum, og hóast naka› av frágongd eisini hevur veri›, so er hendan væl og vir›iliga uppviga›.

N‡ggju leikararnir tykjast at javnviga væl, solei›is at li›i› er sterkt á øllum plássum. Ikki minst er t‡dningurin av n‡ggja málverjanum stórur.

Eitt er, at hon tekur ta›, sum takast skal (og naka› afturat), men harumframt hevur hon eitt útkast, sum hóskvøldi› var upprunin til hópin av málum.

Eisini hevur styrkti hópurin gjørt Ioana Rápa til ein nógv betri leikara. Í fjør og fyrra ári› mundu hon standa fyri á lei› helminginum av VÍF málunum, men so er ikki nú. T‡dningur hennara er tó ikki minni, men har hon fyrr avslutta›i fyri eitt gott or›, ger hon í dag nógv størri mun av hóttanini, fyri sí›ani at spæla vi›leikarar leysar, tá verjan hugsat um hana.

Gomlu dygdirnar hevur tó framvegis, og serliga í seinna hálvleiki s‡ndi hon, at dugur er í vinstra arminum.

Orkan tykist batna

Umframt á›urnevnda styrk, so tykist ta› eisini, sum at orkan á VÍF í ár er munandi størri, enn hon hevur veri› á›ur.

Tær bæ›i tora, orka og megna at verja offensivt, og hetta gevur eisini møguleikan fyri hópin av skjótálopum.

Hetta tóktist eisini at mø›a neistali›i›, sum í bá›um hálvleikunum lá omaná, fyrstu 10 minuttirnar, fyri sí›ani at ver›a runnar um koll í 20 minuttir.

Jú, sanniliga tykjast tær at meina ta› í álvara hetta kappingarári›.

Dysturin í tølum:

Málskjúttar:
VÍF: Sóley› Mikkelsen 8(2), Ioana Rapa 8(1), Frí›a Marjunardóttir 6(4), Nicolina Ey›bjørnsdóttir 4, Alice Høghamar 3, Nicoleta Rado 2, Randi Kúrberg 1
Neistin: Annika Thomsen 5, Susan Brockie 5, Mildrid Jacobsen 2, Súna Mørk 1, Birita wardum 1
Brotskøst: VÍF 8, Neistin 1
Útvísingar: VÍF 3, Neistin 2
Dómarar úr H71: Kristian Martin Skála og Bár›ur Brimvík. Høvdu eina fri›arliga uppgávu, og røktu teir eisini hesa væl.

VÍF-Neistin 40-21 (15-10)

Meistaraspæl móti meistarunum

Ta› var ikki bara hevnd, sum stó› á skránni, tá VÍF hóskvøldi› vant burtur úr Neistanum. Til tí›ir var talan um eina ey›m‡king

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

So løgi› ta› ljó›ar, so mundu fegnastu menninir í Vestmanna vera teir hjá Neistanum, tá tvær fer›ir 60 minuttir endiliga vóru leiktir.

Eitt er at tapa stórt, men eini slíkari ey›m‡king, sum Neistanum var fyri seinastu løtuna av dystinum, munnu teir bláu ikki hava veri› fyri í langa tí›.

Ta› var beinan vegin í dystinum greitt, at ta› var VÍF, sum var betra li›i›. Teir løgdu har›liga fyri, men eftir at Neistin valdi at taka Inga Olsen úr spælinum, ste›ga dragingin hjá vestmenningum naka›. Fimm mál í hálvleikinum bendu sostatt á ein grei›an heimasigur, men , men…

Í seinna hálvleiki var so at siga bert ein gongd. VÍF byrja›i beinan vegin at toga frá, og mótstø›umenninir fingu líti› og einki gjørt vi› hetta. Hvørja fer› Neistin fekk okkurt máli›, gjørdu vestmenningar tvey ella tr‡.

Einasta undantaki› var mi›skei›is í hálvleikinum, tá neistamenn brádliga fingu tr‡ mál á ra›, men kanska hev›i veri› frægari, um teir ikki høvdu gjørt hetta. Í øllum førum tóktist, at VÍF eftir hetta rættiliga tendra›i, og so kundu neistamenn ta› sama veri› farnir heim.

Komandi og farandi

Sum nevnt, so var› seinasta løtan av dystinum ein total ey›m‡king av neistamonnunum. Seinasta korteri› av dystinum enda›i 17-4 til VÍF, og meira enn máltølini var ta› eisini hátturin, sum hetta var› gjørt uppá, sum var nærum ræ›andi.

Eftir at hava hildi› fast um dysitn alla tí›ina, skiftu VÍF eitt gear upp, og úrsliti› var› hareftir.

Neistamenn góvu skarvin fullkomuliga yvir. Tóktust ómotivera›ir og sløsutir, me›an vestmenningar bara dusa›u sær enn meira. Ingi Olsen gjørdi ein hálvan Anja Andersen, men ta› máli› kom tó ikki upp á stø›i á tí, sum Harald Bjørgvin gjørdi í fyrra hálvleiki.

Ta› gerst alsamt meira greitt, at Neistin ikki sleppur at ropa seg meistara meira enn hetta eina ári› - og at sannlíki eftirfylgjarin eitur VÍF

Mynd: Álvur Haraldsen

Komandi og farandi

Eftir dystin sat ein vi› meira enn einum varhuga av, at talan var um komandi og farandi meistarar.

Vestmenningar tykjast vera fullkomuliga í einum flokki fyri seg, og heldur enn at huglei›a um, hvørt ta› eydnast teimum at gerast meistar, fóru tankarnir heldur at sveima móti tónunum, sum ver›a at hoyra í Vestmanna 7. apríl 2001.

Ta› tykist longu nú vera ivamál, um hesir ver›a frá Freddy Mercury vi› »we are the champions« ella um ta› ver›ur Joe Cocker og Jennifer Gray vi› »Up where we belong«.

Og sum eykasetningur kann so skoytast, at Áki Olsen framvegis situr skaddur uttanfyri.

Dysturin í tølum

Málskjúttar:
VÍF: Ingi Olsen 11(5), Martin Hummeland 10, Sámal Joensen 7, Agnar Joensen 6, Harald Bjørgvin 2, Sjúr›ur Holm 2, John Zachariasen 2
Neistin: Kári Mortensen 8(4), Ragnar Zachariassen 5, Helgi Justinussen 3, Elmar Ósá 1, Áki Mørk 1, Regin Didriksen 1, Jacob Jónsson 1, Ári Rouch 1
Brotskøst: VÍF 6, Neistin 4
Útvísingar: Neistin 1
Dómarar úr H71: Kristian Martin Skála og Bár›ur Brimvík. Høvdu ikki alt ov nógv at gera, men hildu seg til uppgávuna uttan stórvegis hóvasták.

Óførir svimjarar

Esther Gaard Hansen, Heidi Andreasen og Katrin Johansen fingu eina stórfingna móttøku hóskvøldi›, tá tær komu heimaftur úr Sydney frá teimum paralympisku leikunum vi› f‡ra hei›ursmerkjum í vi›førinum

SVIMJING
Stefan í Skorini

»Hava vunni› tjó›ini sóma og hei›ur« »hava umbo›a› Føroyar á glæsiligan hátt« »vi› feitum stavum í ítróttarsøguna« »kann ikki gerast upp í pengum« »stórhending fyri bygd og land«.

Lovor› frá fleiri vangagráum, høgum harrum regna›u ni›ur yvir bá›ar svimjararnar og venjaran. Hurra-geylini mundu ongan enda fingi›, og hornblásturin dundi aftanfyri hetjurnar, sum eru afturkomnar úr landinum »Down Under«.

Avriki› má eisini metast sum eitt bragd, tí hóast genturnar bara eru 14 og 15 ára gamlar eydna›ist teimum veruliga at gera vart vi› seg á leikunum, og fleiri undra›ust yvir hesar bá›ar ungu genturnar, sum tóku øll á bóli. Heidi vann tr‡ silvur og eitt bronsu, me›an Esther kom í tvær finalur. Tær settu persónligt met á øllum teinunum, og ta› var máli› vi› fráfer›ina.

Ta› besta eru úrslitini

– Ta› besta vi› hesi fer›ini hevur veri› úrslitini, sum vit hava fingi›. Vit bá›ar hava fingi› gó› úrslit, og ta› eru vit gla›ast fyri, siga tær bá›ar Heidi Andreasen og Esther Gaard Hansen.

Nógv var› gjørt burturúr í ÍSF-húsinum, tá fer›alagi› kom aftur, og nógv fólk vór›u komin saman at hei›ra tær bá›ar. Nógv vildu sleppa framat at halda rø›u, men genturnar sóu naka› mó›ar út eftir eina langa fer›.

– Man kennir seg ógvuliga stóran og t‡dningarmiklan, tá so nógv fólk taka ímóti, letur í teimum.

Ásko›aratali› lá um tey 15.000, tá teir føroysku genturnar svumu, men hetta nerva›i tær ikki stórvegis.

– Man skal bara hugsa, at hetta er ein vanlig kapping og ikki hugsa nógv um allar ásko›ararnar. Man skal bara ímynda sær, at allir ásko›ararnir rópa og brøla eftir tær.

Nakrir av svimjarunum klára›u ikki væl at liva upp til tr‡sti› frá ásko›arunum, og teirra avrik gjørdist verri, enn ta› annars hev›i veri›.

Sunt at fáa silvur ísta›infyri gull

Venjarin hjá teimum bá›um er Katrin Johansen, og hon hevur royndir í slíkum kappingum. Hon i›rar seg ikki naka› serligt um, at ta› ikki eydna›ist Heidi at fáa gullhei›ursmerki.

– Ta› sunt fyri eina 14 ára gamla at vinna silvur og ikki gull, tí so hevur hon naka› at síggja fram til og seta sær sum mál. Tó vónar man altí›, tá kappingin fer fram, at tann føroyski svimjarin kemur fyrst á mál, sigur Katrin Johansen.

– Bá›ar tvær hava klára› seg so fantastiska væl, og um onnur ikki svam, so hev›i hin heldur ikki klára› seg so væl. Tær hava veri› einsamallar í f‡ra mána›ir, og tær hava lyft hvørja a›ra upp og stu›la› hvørjari a›rari, so ta› hevur veri› av stórum t‡dningi, at tær eru tvær, sigur venjarin, sum ikki er sørt errin av avrikinum.

Herja á aftur

Esther Gaard Hansen, sum er úr Havn, og Heidi Andreasen av Ei›i fara ikki at liggja á latu sí›uni, hóast tær júst eru afturkomnar, tí um eina viku ver›ur svimjikapping í Klaksvík, og tær ætla sær bá›ar at luttaka.

Nú er tó ætlanin, at tær bá›ar ikki fara at venja eins nógv og tær hava gjørt seinasu mána›irnar, tá tær ofta hava vant níggju fer›ir um vikuna. Vant ver›ur kanska 2-3 fer›ir, men næsta ár ver›ur fari› í gongd aftur.

Úrslit og tí›ir

Heidi Andreasen:	400 m frí	5.18,91	nr. 2
	100 m frí	1.11,12	nr. 2
	200 m bl.	3.04,93	nr. 4
	50 m frí	0.32,92	nr. 2
	100 m rygg	1.24,84	nr. 3
Esther Gaard Hansen:	400 m frí	6.05,7	nr. 12
	100 m bringu	1.43,03	nr. 18
	200 m bl.	3.13,14	nr. 7
	50 m frí	0.38,27	nr. 12
	100 m rygg	1.31,13	nr. 9
	100 m firvald	1.32,01	nr. 7

OL í Istanbul

Talvolympiada: Føroyingar hava nú leikt seks umfør í OL, og úrslitini hava veri› higartil veri› svingandi. Føroyingarnir løgdu út vi› einum braki, men hava sí›ani havt nøkur smáskuffandi úrslit. John Rødgaard hevur bestu úrtøkuna higartil.

TALV
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Tveir teir fyrstu dystirnir hjá føroyingum enda›u ávíkavist 1-3 ímóti Kekkia og 3-1 ímóti Tunesia. Hetta var› ein gó› byrjan vi› f‡ra stigum av átta møguligum. Burma var› mótstø›uli›i› í 3. umfari, og tann dystin vunnu burmamenn 3-1. Burma er ein sterk talvnatión, og tí var› úrslit heilt hampiligt.

Sí›ani komu tvey ivasom úrslit. Í 4. umfari áttu vit at vunnu ímóti Honduras, sum bert høvdu fyrsta bor› vi› altjó›a ratingtali›. Men hesin dystur enda›i tó 2-2, har fremstu bor›ini hjá okkum, John Arni Nilssen og John Rødgaard óvænta› taptu, me›an Heini Olsen og Ólavur Simonsen sum eisini telva›i ímóti Burma, vunnu.

Zimbabwe var› li›i› føroyingar møttu í 5. umfari, og eisini her vóru vit klárir favorittar, sjálvt um bæ›i John Arni og Rødgaard vór›u skiftir út vi› Flóvin Tór Næs og Ey›un Nolsøe, sum telva›i á fyrsta sinni. Men dystin taptu Føroyar 1,5-2,5. Heini tapti á fyrsta bor›i, me›an Flóvin, Ólavur og Ey›un leikti javnleik.

Fingu vent gongdini

Í sætta umfari bleiv úrsliti› aftur positivt, tá føroyingar hósdagin vunnu 3-1 ímóti Angola. Stilla› bleiv vi› sterkastu manning, har John Arni leikti javnt, Rødgaard vann eitt drúgt talv, Heini leikti javnt á tri›ja bor›i og Flóvin vann á fjór›a bor›i.

Eitt gott úrslit sum skumpar li› okkara naka› fram í samla›a stø›una.

John Rødgaard hevur megna› at fingi› hálvtfjór›a stig til hølvdar av teimum fimm talvunum hann hevur telva›, og er sostatt toppskorari. John Arni hevur havt ta› trupult á fyrsta bor›i. Eingin hevur telva› øll seks talvini.

Føroyar eru seeda›ir sum nummar 75 av 128 londum, og í løtuni eru Føroyar beint undir mi›juni vi› 11,5 stigum av 24 møguligum. T‡skland er fremst vi› 18,5 stigum, me›an Russland hevur 17,5 á ø›rum plássi.

Sætta umfar var› telva› hósdagin og í gjár var frídagur. Sjeynda umfar ver›ur telva› telva› í dag. Meira um OL í t‡sdagsbla›num.

Einstøku úrslitini:

John Arni	1 stig av /5
Rødgaard	3,5 / 5
Heini O.	2 / 5
Flóvin	2,5 / 5
Ólavur	2 / 3
Ey›un	0,5 / 1

-Góðir brúktir frá
REYNI SERVICE

TOYOTA CAMRY 2,2 GL AUTOMATIK
Skrás.: 28-06-96
Km.: 78.000
Prísur: 179.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B
Skrás.: 20-04-99
Km.: 7.000
Prísur: 119.600,- Garanti**

TOYOTA AVENSIS 2,0 T.DIESEL
Skrás.: 09-09-98
Km.: 49.000
Prísur: 178.600,- Garanti**

TOYOTA COROLLA 1,3 GALLA
Sýnaður 12-99
Skrás.: 01-05-95
Km.: 139.000
Prísur: 87.600,- Garanti*

TOYOTA AVENSIS 2,0 T.DIESEL
Skrás.: 24-04-98
Km.: 108.000
Prísur: 162.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 1,6 AUT. GEAR
Skrás.: 17-04-96
Km.: 62.000
Prísur: 103.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA E 2,0 Gli SED.
Skrás.: 30-04-98
Km.: 24.000
Prísur: 148.600,- Garanti**

TOYOTA COROLLA 1,3 GLS H/B
Skrás.: 16-10-97
Km.: 52.000
Prísur: 103.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA E 2,0 Gli Aut.gear
Skrás.: 13-06-96
Km.: 82.000
Prísur: 127.600,- Garanti*

TOYOTA STARLET 1,3 Xli 5 HURÐAR
Skrás.: 27-08-97
Km.: 38.000
Prísur: 72.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA E 1,6 CDX
Sýnaður 01-00
Skrás.: 16-10-96
Km.: 39.000
Prísur: 117.600,- Garanti*

VOLVO 460 SEDAN
Sýnaður 06-99
Skrás.: 25-05-90
Km.: 92.000
Prísur: 48.600,-

TOYOTA CARINA E 1,6 SEDAN
Sýnaður 03-00
Skrás.: 30-05-94
Km.: 107.000
Prísur: 98.600,- Garanti*

HONDA ACCORD 1,8
Skrás.: 01-11-97
Km.: 53.000
Prísur: 148.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 2,0 Gli
Sýnaður 03-00
Skrás.: 02-07-90
Km.: 170.000
Prísur: 65.600,-

OPEL ASTRA 1,7 TURBO DIESEL
Skrás.: 31-07-96
Km.: 105.000
Prísur: 99.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 2,0 Xli
Skrás.: 19-10-90
Km.: 122.000
Prísur: 57.600,-

FORD ESCORT 1,8 DIESEL
Skrás.: 13-12-95
Km.: 87.000
Prísur: 78.600,- Garanti*

TOYOTA CARINA 1,6 Xli
Sýnaður 09-00
Skrás.: 11-06-91
Km.: 108.000
Prísur: 48.600,-

FORD MONDEO 2,0 AIR-CON
Skrás.: 02-07-96
Km.: 52.000
Prísur: 120.600,- Garanti*

TOYOTA COROLLA 2,0 DIESEL
Skrás.: 26-06-96
Km.: 100.000
Prísur: 115.600,- Garanti*

FORD FIESTA 1,8 DIESEL
Skrás.: 27-07-93
Km.: 115.000
Prísur: 58.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 SEDAN
Skrás.: 25-02-98
Km.: 42.000
Prísur: 119.600,- Garanti**

KIA SEPHIA 1,5
Skrás.: 17-04-97
Km.: 59.000
Prísur: 62.600,-

TOYOTA COROLLA 1,3 H/B
Sýnaður 10-00
Skrás.: 29-12-98
Km.: 20.000
Prísur: 125.600,- Garanti**

AVHEINTINGARTILBOÐ

TOYOTA CAMRY 1,8 XL
Sýnaður 04-99
Skrás.: 30-06-88
Km.: 240.000
Prísur: 15.600,-

VØRUVOGNAR

TOYOTA DYNA 150 V/ LAST
Skrás.: 24-02-97
Km.: 100.000
Prísur: 90.600,-

TOYOTA CARINA 1,6 DX
Sýnaður 05-00
Skrás.: 09-06-87
Km.: 221.000
Prísur: 15.600,-

MAZDA B-2500 PICK-UP DIESEL
Skrás.: 11-05-00
Km.: 9.000
Prísur: 138.600,-

VW TRANSPORTER
V/ DUP. KABINU
Skrás.: 17-02-87
Km.: 190.000
Prísur: 8.600,-

VW LT 35 VAN
Skrás.: 30-06-93
Prísur: 39.600,-

* Brúktir bilar yvir 75.000 kr. verða seldir við BRÚKTBILAVÁTTAN
** TOYOTA bilar hava 3 ára garanti frá fyrstu skrás. dato

REYNI SERVICE
Opið: Mán.-frí. 8.00-17.00
TOYOTA Reyni Service
Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040
Sosialurin - 311820